Álit

í

løgtingsmáli nr. 47/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Broyting í brúkstreytini fyri at avhenda egnar fiskidagar og egnar kvotur, broyting í brúksskylduni á veiðiloyvi, fiskiloyvi, egnar fiskidagar og egnar kvotur, og broytt áseting um gildiskomu)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð tann 8. november er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15., 22. og 29. november og 5. desember 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Reiðarafelagið og landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið, sum fyriliggur, er í ávísan mun sambæriligt við tað uppskotið, sum undanfarna samgonga legði fyri Løgtingið.

Samanfall er í tí generellu brúksskylduni, har eitt veiðiloyvi og eitt fiskiloyvi, sum als ikki hevur verið virkið í tvey ár á rað, fellur aftur til landið.

Samanfall er eisini í ynskinum at strika 30% regluna, sum segði, at um tú ikki hevði brúkt 30% av rættindunum, so fall tað, sum var millum tað brúkta og 30%, aftur til landið. At hetta verður tikið úr lógini er eftir hugsanini hjá meirilutanum gott fyri vinnuna, tí hetta ger skipanina einfaldari.

Í § 31, stk. 2 stendur: "Fyri at avhenda egnan kvotupart ella egna árskvotu, skulu frá og við 1. januar 2025 í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari."

Tað er eftir okkara tykki sera óheppið, at hendan ásetingin er galdandi bæði fyri avhendingar fyri eitt ár í senn og fyri endaligar avhendingar.

Fyri at umganga sonevndar sofaseljarar í skipanini er hendan reglan góð, tá talan er um at selja fyri eitt ár í senn.

Tá talan er um endaligar avhendingar, er hendan ásetingin sera óheppin. Orsøkin er, at hendan reglan kann verða orsøk til, at rættindi verða fangaði í skipanini.

Um ein rættindahavari, av einhvørjari orsøk, ikki hevur brúkt 60% av sínum rættindum árið fyri og ynskir at selja burturav hesum rættindunum endaliga, so sleppur hann ikki at gera tað, tí hann ikki

lýkur treytirnar fyri at selja. Sostatt verða veiðimøguleikar og veiðivirði læst føst í skipanini og koma í prinsippinum ikki til gagns fyri føroyska samfelagið.

Er støðan tann, at eitt fiskifar ongantíð kemur uppum 60% av tillutaðu kvotunum ella fiskidøgunum, eru tey rættindini, sum hetta fiskifarið ikki brúkar, læst føst «í allar ævir» og harvið spill í systeminum.

Hetta er ikki í samsvari við ynskið um, at alt okkara tilfeingi verður gagnnýtt.

So hóast lógaruppskotið hevur fleiri góðar tættir, so eru lýti við uppskotinum.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 3 verður í § 31, stk. 2, 1. pkt. aftan á "árskvotu" sett: "fyri eitt fiskiár í senn,"

Viðmerkingar
Við broytingini verður 60% reglan bert galdandi fyri avhendingar fyri eitt ár í senn. Reglan verður sostatt ikki galdandi, tá talan er um endaligar avhendingar.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Annika Olsen, Karlot Hergeirsson og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Fiskirættindi, sum landið letur, er ein framíhjárættur at troyta fólksins ogn, og hesi fiskirættindi eiga at verða gangnýtt á besta hátt. Tað skulu vit krevja av teimum, sum umsita loyvini. Tað er ein avmarkaður skari, sum hevur atgongd til veiðirættindi, og tað er rætt at áleggja teimum, ið fáa hesi rættindi, eina skyldu at brúka tey. Um ikki, so eiga tey at falla aftur til landið, so onnur kunnu troyta hesi rættindi og møguleikar.

Í samgonguskjalinum er ásett, at brúksskylda skal vera ásett í allari fiskivinnuni í tann mun, at hendan er burðardygg. Tí fegnast hesin minnilutin um, at neyvari ásetingar vera um brúksskylduna.

Tað skal undirstrikast, at fiskirættindini eru ein tíðaravmarkaður brúksrættur, ið bara er til láns, og tað er bæði rætt og rímiligt, at brúksskylda verður ásett. Gongdin í fiskivinnuni hevur stóran týdning fyri føroyska búskapin, og tað er neyðugt at hava greiðar karmar fyri vinnuna, so sum mest fæst burturúr fiskiríkidøminum. Hetta verður brúksskyldan við til at bøta um.

Støðan í fiskivinnuni er, at ongin generell brúksskylda hevur verið á fiskirættindinum, sum landið letur. Tað vil siga, at rættindahavarar kunnu sita við loyvum, uttan at somu rættindahavarar brúka loyvini. Ásetingar um brúksskyldu hava verið galdandi, síðan sjófeingislógin kom í gildi 1. januar 2018, men hon hevur ongantíð fingið reellan virknað.

Viðvíkjandi 60% regluni í samband við avhending av egnum fiskidøgum og egnum kvotum verður lagt upp til tvær broytingar:

1. Gildiskoman verður útsett við einum ári sammett við galdandi lóg. Her er støðan tann, at gagnnýtslan í 2023 er avgerandi fyri, at rættindi kunnu avhendast frá og við 1. januar 2024. Við hesum uppskotinum verður gildiskoman soleiðis, at hon er galdandi fyri avhendingar frá og við 1. januar 2025.

2. Nýggj heimild verður ásett, har tað er møguligt at víkja frá 60 % regluni fyri avhending av kvotum fyri eitt fiskiár í senn. Her er talan um í heilt serligum føri, har heildarkvoturnar eru somikið lítlar og smábýttar, at tað ikki er grundarlag fyri rakstri hjá øllum fiskiførunum í bólkinum. Hetta kann eisini verða við til at stuðla undir eina meira skynsama gagnnýtslu av fiskatilfeinginum. Talan kann eisini vera um undantaksreglu, tá veiðibann er ásett, ella um stovnurin er so mikið illa fyri, at ráðiligt ikki at fiska hann.

Generella brúksskyldan verður varðveitt í mun til brúksskyldu á veiðiloyvi og fiskiloyvi. Í uppskotinum verður brúksskyldan á veiðiloyvi óbroytt. Um fiskifar ikki hevur verið til vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað, fellur veiðiloyvið aftur til landið, og somuleiðis fella øll fiskiloyvi, ið eru knýtt at fiskifarinum, aftur til landið.

Somuleiðis er við fiskiloyvinum. Um eigari av fiskifari ikki hevur brúkt ávíst fiskiloyvi við egnum fiskidøgum og egnum kvotum tvey ár á rað, so fellur fiskiloyvið aftur til landið.

Undantikin brúksskyldini á fiskiloyvi eru fiskiloyvi og veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons. Somuleiðis eru rættindi, keypt á uppboði í 2018 og 2019, sum er partur av sonevndum kvotu-transfers, undantikin brúksskyldu.

Ein onnur høvuðsbroyting er viðvíkjandi generellu brúksskyldini. Tað er at strika ásetingina um, at um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, sum er brúkt og 30%, aftur til landið. Mett verður, at hendan ásetingin er ov víðgongd, og hava flest øll, sum hava verið hoyrd í hesum máli, tikið undir við hesum.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at pelagiskur fiskur framvegis er undantikin brúksskylduni. Tað er orsakað av heimaflotanum, sum eisini hevur makrelloyvi. Politiskt er ætlanin framvegis at leggja brúksskyldu á makrelrættindi, men tað krevur meira fyrireikingararbeiði. Tí verður tað ikki gjørt í hesum umfari.

Minnilutin heldur, at tað er eingin orsøk til, at sild og svartkjaftur eru undantikin brúksskylduni, tí fyri hesi fiskasløgini er galdandi, at tey rættindini verða brúkt ella fult gagnnýtt hvørt ár.

Minilutin fegnast annars um, at ásetingar um brúksskyldu loksins eru ásettar til gagns fyri føroyska samfelagið.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 3 verður § 31, stk. 2, 3. pkt., orðað soleiðis:
”Makrelur er undantikin brúkstreytini.”

2. Í § 1, nr. 5 verður § 36, stk. 4, nr. 4 orðað soleiðis:

”4) fiskiloyvi latin til fiskiskap eftir makreli.”

Viðmerkingar
Við hesi broyting verður tað einans makrelur, ið verður undantikin brúkstreytini í § 31 í mun til avhending og brúksskylduni í § 36 í mun til, at rætturin til fiskiloyvi fellur aftur til landið, og ikki svartkjaftur og norðhavssild.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 11. desember 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	